# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein stórhending

Barak Obama verður uttan iva kosin til forsetavalevni hjá Demokratunum í USA. Hetta, at maður av afroamerikanskum uppruna verður kosin forsetavalevni, er veruliga ein politisk stórhending. Hetta eru at kalla allir eygleiðarar samdir um. Tá vit hava í huga, at tað eru ikki meiri enn eini tjúgu ár síðan, at øll tey svørtu í USA fingu veruligan valrætt, so er hetta eitt risastórt stig í longu og pínufullu søgu teirra svørtu at vinna somu borgarligu rættindi sum tey hvítu høvdu.. Obama hevur gjørt øllum døprum spádómum fyri skommum og hann hevur nú sett beina kos móti Hvítu húsunum.

Mótstøðumaður Obama verður John Mcain, ein eldri stríðshetja, ið hevur gott umdømi millum amerikanarar orsakað av fortíðini og ikki minst tí, at hann ofta hevur tikið serstøðu í stórum politiskum málum og hevur sostatt torað at gingið ímóti Republikanska flokkinum. Hann heldur lítið um Bush, og Bush hevur tað á sama hátt við Mcain.

Hvønn politikk fara so hesir menn at reka, tá annar teirra kemur í forsetaembætið? Innanríkis fer Obama at reka ein politikk til gangs fyri amerikansku verkamanna- og miðalstættina. Hann fer at avtaka skattalættan hjá teimum ríku og nýta vinningin til at seta í verk eina ókeypis almenna sjúkatrygging fyri børn og tannáringar. Hann fer at reka ein protektionistiskan búskaparpolitikk, og hann fer at leggja dent á umhvørvið. Uttanríkispolitiskt fer hann at taka herin úr Irak men halda fram við krígnum í Afghanistan og annars at vera meira semjusøkjandi enn verandi forsetin. Mótstøðumaðurin, John Mcain, er hann hóast atfinningarsamur móti Bush minst líka so konservativur, ja, hann er enntá meiri konservativur enn Bush á ávísum økjum. Hann fer at halda fram við kríggjunum í Irak og í Afghanistan og hann fer at reka sama fíggjar- og búskaparpolitikk sum núverandi forseti, altso ein politikk fyri tey ríku.

Flestu serfrøðingar eru samdir um, at forsetavalið verður heilt óvanliga spennandi og torført er at spáa um úrslitið. Obama hevur gjørt eitt ómetaliga stórt bragd við at vinna uppstillingarstríðið – megnar hann eisini at vinna forsetasessin? Tað, sum hann hevur í móti sær, er, at hann er so óroyndur, og so kann ikki útilokast, at rasuspurningurin fer at ávirka møguleikar hansara. Rasisman í USA er enn sterk og nógvir veljarar duga illa at hugsa sær ein forseta, ið ikki hevur hvítan húðalit. Tað er løgið, at heimsins sterkasta og mest framkomna land á er so tilafturskomið, tá talan er um sosialpolitikk, moralskar spurningar eins væl og rasuspurningar. Tey, sum ynskja frið og framburð og sum ynskja eitt USA, sum ikki støðugt heldur við einaræðisbúrkroppum og sum velur diplomati fram um hermegi, vóna, at Obama vinnur. Hini sum vilja, at alt skal vera, sum tað hevur verið, ynskja sær Mcain. Vit kunnu ikki dylja, at vit eru Obamastuðlar. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## Hartið ikki starvsfólkini í heilsuverkinum!

**BERGTÓRA H. JOENSEN**



Funnist verður at – í grein í Dimmu 3. juni ‘08 - at 35 sjúkrarøktarfrøðingar hava verið á ráðstevnu í Svøríki. Eg kann fyri mín part siga, at eg haldi tað vera í fínasta lagi.

Í greinini lesi eg at ein landsstýrismaður “skilur tað als ikki” og ein flokksformaður “heldur tað virka løgið”. Eg má tí siga, at teir ikki tosa fyri allar politikarar. Eg fegnist um at hesi mennniskju fóru á ráðstevnu.

Vit politikarar skulu ikki vága okkum at finnast at, um nøkur starvsfólk innan heilsuverkið hava fingið nakað av íblástri. Tað er teimum so væl unt!

Tey sum hava verið á góðum ráðstevnum vita, hvussu gevandi ein sovorðin er:

- arbeiðsgleðin økist
- ein kennir seg betri ílatna/n fakliga
- ein fær hug at bretta upp um armar, tá ein kemur aftur til arbeiðis
- førleikamenning er neyðug, um ein skal brenna fyri arbeiðinum, heldur enn at brenna út.

Vit hava ein stóran trupulleika í mun til heilsuverkið – peningaliga. Men lat okkum ikki varpa ringt ljós á eldsálirnar, sum fara til arbeiðis hvønn dag og eru um tey sjúku og avvarðandi teirra. Ein ráðstevna skal vera teimum so væl unt. Innan flestøll starvsfólkaøki í heilsuverkinum er persónurin sjálvur – menskan/persónligheitin eitt hitt týdningarmesta amboðið.

Á landssjúkrahúsinum – Føroya størsta arbeiðsplássi - er eingin starvsfólkadeild. Sera hugvekjandi og lítið gleðiligt. Vóni, at ein starvsfólkadeild sum arbeiðir millum annað við førleikamenning og trivnaði skjótt gerst veruleiki.

Tøkk fáið tit, sum gera eitt megnar arbeiði í heilsuverkinum hvønn einasta dag og góðan arbeiðshug!

## Mamma Mia, nú mundi eg dottið uppeftir!

**RANDI Í JÓGVANSSTOVU**
kommunustýrislimur



Eg sum helt, at øll høvdu gloymt okkum her í Leirvík, eins væl og Landsverk »gloymdi« at brúka tær 10 mill. hann fekk í fjør, til at gera tann vegin, Føroya Løgting samtykti tann 16.5.2006. Nú kemur Rúna Sivertsen í bløðini í farnu viku og skrivar um eina brúgv. Satt at siga bleiv eg so fegin at eg leyp í leysari luft, vit eru ikki heilt gloymd. Hon vísir eisini á, at hettar er ein nógv styttri farleið, enn at fara niðan um bygdina, umframt tað, so er ein brúgv ferðslutryggari, praktiskari og bíligari. Bert spell, at grótið, sum skuldi til fyri at fáa brúnna upp í hæddina, ikki longur er til, tað var tað tá. Hon vísir eisini á, at brúgvin lítla og onga umrøðu hevur fingið. Har eru vit ikki heilt samdar. Vit eru fleiri, sum gjøgnum ár og dag hava víst á eina loysn við einari brúgv. M. a. skrivaði bygdarmaður okkara Jákup Joensen, sáli, eina langa grein í Dimmalætting, har hann vísti á, hvussu hettar kundi gerast, einsvæl og hann vísti á, at ein vegur omanfyri bygdina, fer at vera til ampa fyri tey, sum skulu búgva har í framtíðini, umframt alt tað góða byggilendi, sum fer til spillis til vegin, vísti hann á fleiri aðrar vansar. Eisini hevur undirritaði í grein í Sosialinum tann 19.3.2002 víst til, at tað kundi verið eitt gott hugskot at gjørt eina brúgv. Tíverri vísti Landsverk hesum frá sær við teirri grundgeving at: Tað fór at skemma (misprýða) landslagið. Eg meini tað. Hugsi ikki, at Landsverk eru teir røttu at tosa um tað, sum skemmar landslagið. Her hugsi eg um øll tey »gyseligu« grótbrotini kring alt landið, tey liggja sum opin sár í landslagnum og ýla út í tóman heim, fyri ikki at nevna øll hesi ljótu tunnilsportrini (kundi tað verið eitt hugskot og bjóða listafólkum eitt nú fólki við skil fyri grafitti, at hampa eitt sindur um). Far ein túr út á Strendur, eftir hesum fína nýggja vegnum, vegbakið sær út sum onkur hevur mist ein sekk av handgranatum hist og pist. Vegurin er fínur at koyra eftir, alt gott um tað, hygg bara ikki síðuvegis, so fært tú eitt sjokk, ljótari fekst tað ikki. Og sama skili so nógva aðrastaðni í landinum.

Men aftur til Rúnu Sivertsen, takk eigur tú, fyri at tú hugsar um okkum og trygdina hjá børnum okkara, eisini fyri at tú vísir á eina góða loysn. Vit eru nógv her, sum kenna okkum illani viðfarin og tað fløvar, tá fyrrverandi forkvinnan fyri Ráðið fyri ferðslutrygd, brúkar sína tíð uppá okkum illa sperdu leirvíkingar, takk fyri tað.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddː**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.